# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Postverk Føroya 30 ár:

## Áhugaverd framsýning á Óðinshædd

TÍÐINDASKRIV

Í samband við at 30 ár eru liðin síðan postverkið varð yvirtikið og postfelagið varð stovnað, er ein áhugaverd framsýning við nógvum gomlum lutum og umleið 400 myndum sett upp hjá Postverki Føroya á Óðinshædd í Havn.

Framsýningin verður opin í komandi viku (viku 19), mánadag-fríggjadag frá kl. 13-16. Áhugaði kunnu venda sær til avgreiðsluna á Óðindhædd.



Inni í posthúsinum
í Hvannasundi 10. avg. 1982.
Vit síggja posthúsleiðaran *Niels í Bud.*






*Komandi viku verður ein áhugaverd framsýning við nógvum gomlum lutum og umleið 400 myndum hjá Postverki Føroya á Óðinshædd í Havn*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Kommunuskúlin í Havn fimmti



2. september í ár verða tað 50 ár síðani Tórshavnar Kommunuskúli varð liðugur og tikin í nýtslu. Tá Skúlin varð tikin í nýtslu í 1956, var hann ein nútímans skúli við øllum teim hentleikum, sum tørvur var á

Upp í TK hoyrdi eisini skúlin á Frúutrøð. Næmingarnir hava tí verið nógvir, okkurt árið fór samlaða næmingatalið upp um 1100, men tá var eisini hvørt skot nýtt til undirvísing, og harafturat vóru fleiri flytiflokkar. Í gomlu sethúsunum "Húsunum hjá frk. Cohr" vóru tvær stovur á miðhæddini og á loftinum vóru nøkur smá hølir til serundirvísing. Í barakkini vóru tvær skúlastovur, og í Gamla Realskúlanum vóru 7 hølir. Ikki vóru flokkarnir minni enn nú, heldur tvørturímóti, so har var sera trongligt.

Um Gamla Realskúlan skal harafturat sigast, at hann eisini er komin upp í árini, heili 90 ár.

Kommunuskúlin hevur ikki bert verið nýttur til undirvísing av fólkaskúlanæmingum.

Føroya Læraraskúli brúkti nakrar serstovur t.d. alis/evnafrøðisstovuna, smíðstovuna og aðra fimleikarhøllina fram til 1968, tá flutt varð í nýggj hølir á Frælsinum.

Føroya Handilsskúli, sum í nógv ár var kvøldskúli, nýtti eisini Kommunuskúlan, til skúlin við Marknagil varð tikin í nýtslu.

Kvøldskúlin og seinni Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli hevur eisini hildið til her, og ger tað fyri ein part enn.

Harafturat vóru hølirskúlans nýtt til m.a. tónleikavenjingar, framførslur, fundir, val, og tílík almenn tiltøk.

Skúlin hevur havt ein sera stóran týdning fyri mentanina í høvuðsstaðnum, og vit kunnu fegnast um, at tílík hølir eru mitt í býnum.

Sjálvt um skúlin er gamal og slitin,ella kanska akkurát tí, eru allarflestu okkara góð við Kommunuskúlan.

Tí ætla vit at hátíðarhalda dagin við ymsum tiltøkum bæði fyri stór og smá.

Okkurt tiltakið megna vit ikki einsamøll. Vit heita tí á fólk, ið liggja inni við einum hvørjum, sum hevur tilknýtið til TK, at hjálpa okkum. Ja, í roynd og veru, eru vit takksom fyri alt, sum kann gera jubileumsárið væleydnað.

– Tey, sum hava okkurt at lata/læna okkum, kunnu skriva, ringja ella maila til skúlan. Eisini eru tit vælkomin at støkka inn á gólvið, sigur Páll Poulsen vegna jubileumsnevndina í Tórshavnar Kommunuskúla.

**Teimum tørvar t. d.**

Myndir, filmir, ljóðupptøkur
Klæðir frá teim seinastu fimti árunum
TK-pennar frá fyrsta skúladegi
TK- fimleikabúnar
Sangir, vísur
Søgur- bæði skemtiligar og álvarsligar
Gamlar skúlabøkur, rokni-og skriviheftir
Karakterbøkur
Gomul skúlaborð.

Adressur og nummur: Tórsgøta 25 FO -100 Tórshavn
Tlf.: 302580 Fax.: 302581 E-postur: KOM@skulin.fo
Eisini ber til at ringja: 51 83 64 ella senda e-post til: Páll.Poulsen@skulin.fo
Páll Poulsen ¤ Tjarnarlág 15 ¤ FO 100 ¤ Tórshavn ¤ Tlf 318364 / 518364¤
E-post:pallpo@kallnet.fo, pall.poulsen@skulin.fo